# Børnini trivust væl

**Hjúnini Livar og Svanna Nysted úr Hvannasundi høvdu teirra fýra børn við. Hóast tað onkutíð var rokaligt, so hugnaðu tey sær kortini umborð**

**JÓLATÚRUR**
*Snorri Brend*

At Norröna eisini er eitt gott skip hjá børnum at vera, kunnu hesi hjúnini úr Hvannasundi skriva undir uppá.

Tá Smyril Line byrjaði at lýsa við hesi ferðini, so var tað rættiliga skjótt at tey tóku avgerð um at fara til Aberdeen.

Ætlanin var at keypa jólagávur, eins og so mong av hinum ferðafólkunum. Og tey gjørdust ikki vónsvikin av túrinum.

Har var rættiliga nógv at fáa í handlunum. Og serliga klæðini vóru bílig, siga Svanna og Livar.

Tey keyptu kortini ikki bert gávur og klæðir til sín sjálvs, men tey høvdu eisini ein lista við, har ymiskt ting skuldu keypast fyri onnur.

## Spælipláss

Norröna er jú eitt stórt skip, og er tað nakað børnunum dáma so er tað at hava stórt pláss at flyta seg í og renna í.

Hetta stóra plássið gjørdu hesi børnini úr Hvannasundi eisini brúk av, men luttóku eisini í nógvum av tí, sum varð fyriskipað fyri børnum umborð.

Teimum dámdi sera væl at klippa og gera jólapynt saman við Angelu.

Jú, eg haldi, at teimum hevur dámað væl, sigur Livar.

Enn er avgerð ikki tikin, um tey fara við aftur næsta ár, væl at merkja um ein slíkur túrur verður gjørdur aftur.

Eg rokni næstan við, at vit fara avstað aftur. Hesa ferð vóru eingir stabilisatorar, men teir vera vónandi í lagi næsta ár.

Og tá vænti eg, at vit hava gloymt alt um at skipið rullaði eitt sindur hesaferð, sigur Livar við einum brosi.



*Svanna og Livar Nysted úr Hvannasundi vóru við, og ætla sær aftur, um túrurin verður næsta ár*


*a at øllum tí, sum hugsast kann til jólagávur og persónlig ting*

# Næstu ferð sleppa konurnar við


*Tríggir grannar úr Miðvági vóru skjótir at tekna seg til túrin – vm.: Sjúrður Poulsen, Eyðfinn Johiannesen og Poul Johannus Næss*

**Tríggir grannar úr Miðvági slógu seg saman og teknaðu seg til jólatúrin. Tað angra teir ikki**

**JÓLATÚRUR**
*Snorri Brend*

Sum góðir grannar hittast teir tríggir ofta til eitt prát – Sjúrður Poulsen, Eyðfinn Johannesen og Poul Johannus Næss.

Eitt av hesum kvøldunum høvdu hesir tríggir miðvingarnir fingið eyga á somu lýsing – um ein jólatúr við Norrönu til Aberdeen.

Og teir gjørdu ikki mætari enn at tekna seg allir samlir til henda túrin.

Vit tóku bara og ringdu til Smyril Line, og soleiðis komu vit við á henda túrin, siga Sjúrður og Poul Johannus.

Nú teir fóru avstað høvdu teir ein lista við sær við tí, sum keypast skuldi í handlunum í Aberdeen.

Úrvalið var sera sera stórt, - so stórt, at vit onkutíð ivaðust í, hvat vit skuldu velja.

Tá var gott at hava eina fartelefon, so ein líka kundi tjekka av harheimi við konuna, áðrenn vit keyptu, siga teir báðir.

Báðir eru teir sera væl nøgdir við túrin, bæði umborð á skipinum og í landi.

Verður túrurin gjørdur aftur næsta ár, so fara vit við aftur. Men tá ætla vit at taka konurnar við, siga Sjúrður og Poul Johannus.